Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrød 4
100 Tórshavn

Att: Niels W. Poulsen, adv

Tórshavn, tann 18. august 2026

Viðv.: 26/00357 - Sp/f Gráastein, Sp/f Ango og Sp/f 07.05.2026 leggja saman

Kappingareftirlitið hevur tann 2. juli 2026 móttikið eina einfalda fráboðan um ein samanlegging millum Sp/f Gráastein, Sp/f Ango og Sp/f 07.05.2026. Eftir §17, stk. 5 í kappingarlógini byrja freistin í §18, stk. 1 tá Kappingareftirlitið hevur móttikið fullfíggja fráboðan og skjalprógv fyri rindaðum ómaksgjaldi. Freistin byrðaði tann 7. juli 2026 .

Ein av tveimum eigarum í Sp/f Gráastein, skrá. nr. 7659, ynskir at traðka úr felagnum. Í hesum sambandi ynskja Kim Durhuus og eigararnir av Sp/f Ango, skrás. nr. 7715, og Sp/f 07.05.2026, skrás. nr. 6709 at yvirtaka partin hjá Birgir Lützen. Í sambandi við yvirtøkuna verða feløgini SP/f Gráastein, Sp/f Ango og Sp/f 07.05.2026 løgd saman, har Sp/f Ango verður framhaldandi felagið.

Allar tríggjar luttakandi fyritøkurnar hava virksemi innan uppisjóvarvinnuni í Føroyum. Sp/f Ango hevur rikið fiskiskipið Ango, TG 752 og avreiddi fyri áleið 70 mió. kr. í 2024, Sp/f Gráastein hevur rikið fiskiskipi Birita, TN 132, og avreiddi fyri áleið 91 mió. kr. í 2024, síðsta felagið Sp/f 07.05.2026 er úrslit av eini kloyving av felagnum P/f Kinnfelli. P/f Kinnfelli avreiddi fyri áleið 110.319.868 í 2024 og fráboðari metir at helvtin av virðinum eigur at roknast við til partin hjá Sp/f 07.05.2026.

Skráseting Føroya hevur góðkent kloyvingina tann 14. august 2026 og Vørn hevur tann 9. juni 2026 góðkent samanleggingina í mun til ásetingarnar í sjófeingislógini um miðsavnan av kvotum og í mun til ognarskap.

Framhaldandi felagið kemur at standa fyri áleið 8-10% av avreiðingarvirðinum av makreli, svarkjafti og norðhavssild.

Luttakandi fyritøkurnar eiga øll uppisjóvarfiskirættind, men meta at tað er meira lønsamt at leggja hesi rættindi saman og reka tey undir einum. Eftir samanleggingina fer framhaldandi felagið Sp/f Ango at eiga og reka skipi Birita, TN 132, meðan skipini Ango, TG 752 og Katrina Jóhanna, VA 410, verða ikki í framhaldandi felagnum.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 1 kappingarlógini, ið eru støður har tvær ella fleiri fyritøkur, sum hava virkað sjálvstøðugt, verða lagdar saman. Umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri markvirðini í §14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini. Talan er um transaktiónir har tær luttakandi fyritøkurnar samanlagt hava ein árligan umsetning á í minsta lagi 75

milliónir krónur í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 milliónir krónur í Føroyum.

Fráboða er eftir einfaldum leisti, tí transaktiónin kemur undir §3, stk. 1, nr. 7 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 um samanleggingar. Talan er um støður har luttakandi fyritøkur reka virksemi sum krevur loyvi sambært kapittul 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23 desember 2019 um sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 155 frá 20. desembur 2023.

Grundað á fyriliggjandi upplýsingar hevur Kappingareftirlitið tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. §15, stk. 7 í kappingarlógini, vísandi til §15, stk 2 í kappingarlógini um, at ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping skal góðkennast.

Góðkenningin er treytað av at upplýsingarnar, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sbrt. §20 í kappingarlógini.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
Fulltrúi